**Kristina Háfoss**
**løgtingskvinna**

**Munnligur fyrispurningur**

**til**
**Kaj Leo Holm Johannesen, løgmann**

**Viðvíkjandi endurskoðan av lønar- og pensjónsviðurskiftum**

1. Nær fer løgmaður at leggja fram uppskot, at fremja broytingar í lønar- og pensjónsviðurskiftum hjá landsstýrisfólkum?
2. Nær verður uppskot lagt fyri Løgtingið um at endurskoða lønar- og pensjónsviðurskifti hjá løgtingsfólkum?

**Viðmerkingar**
Í áravís hevur verið bíðað eftir, at ein endurskoðan skuldi fara fram av lønar- og pensjóns-viðurskiftunum hjá landsstýrisfólkum og løgtingsfólkum. Fleiri álit og tilmæli eru skrivað, men enn er einki ítøkiligt úrslit komið burturúr.

Núverandi løgmaður hevur boðað frá, at broytingar skulu fremjast, men enn bíða vit eftir, nær ítøkiligt uppskot til broytingar í lønar- og pensjónsviðurskiftunum hjá landsstýrisfólkum verður lagt fram. Eisini verður bíðað eftir, at lønar- og pensjónsviðurskiftini hjá løgtings-fólkum verða endurskoðað.

Fleiri viðurskifti eru, ið eiga at verða endurskoðað og broytt – eitt nú pensjónsviðurskiftini, skattafríu koyripengarnir og dupultløn á Løgtingi og í landsstýri.

Fyri at fáa lýst, nær væntast kann at nakað ítøkiligt hendir í hesum máli, so broytingar verða framdar, verða hesir spurningar settir løgmanni.

**Á Løgtingi, 8. oktober 2013**

Kristina Háfoss